# Bjørt handaði virðisløn í London

**Í síðstu viku var Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum á ferð í Londan, har hon varð biðin um at handa virðislønina til "Lloyds´ List Shipmaster of the Year"**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindensikov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Landsstýrið er farið undir at menna FAS. Í hesum sambandi var landsstýriskvinnan í vinnumálum, Bjørt Samuelsen, saman við umboðum frá shipping- og fíggjarvinnuni og embætisfólki í London í døgunum 1.-3. apríl til tess at hitta fólk innan shipping og kunna um FAS.

Landsstýriskvinnan og umboðini fyri vinnuna luttóku í árliga " Lloyds´ List London Awards", har feløg og einstaklingar innan shippingvinnuna savnast at handa virðislønir til persónar og virkir, sum hvør á sínum øki hava skarað framúr, shipping-vinnuni til frama.

Bjørt Samuelsen var í ár biðin at handa virðislønina til "Lloyds´ List Shipmaster of the Year". Heiðurin fekk Alistair Mc Fadyen, kapteinur, fyri hansara framúrskarandi leiðaraavrik í sambandi við hending í Biscaya Víkini í mars 2007, og landsstýriskvinnan nevndi í handanarrøðu síni, at hon sum umboð fyri sjófararatjóðina Føroyar var sera errin av at fáa høvi til at handa hesa virðisløn.

Undir vitjanini varð eisini vitjað hjá Lloyds'List, har blaðstjórin nýtti høvi at gera samrøðu við Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinnu og ferðalag hennara um FAS og onnur vinnuviðurskifti í Føroyum.

Somuleiðis vitjaði landsstýriskvinnan eisini sendistovu Føroya í London, har sendimaður Føroya, Sigmundur Ísfeld, greiddi frá virksemi teirra og tosað varð um ætlaninar at styrkja arbeiðið við vinnuframa á sendistovunum.

Eisini hitti landsstýriskvinnan sendimann Danmarkar Birger Riis-Jørgensen.



*Bjørt Samuelsen handaði Alistair Mc Fadyen, kapteini, heiðurin fyri framúrskarandi leiðaraavrik í sambandi við eina hending í Biscaya Víkini í mars í fjør*

SEV
www.sev.fo

# MASKINMEISTARAR
til Fossáverkið

Tvey størv sum maskinmeistari á Fossáverkinum eru leys at søkja. Tað eina er eitt fast starv til setan skjótast gjørligt, hitt er eitt tíðaravmarkað starv til setan skjótast tilber og fram til 15. juni 2009.

Arbeiðið umfatar rakstur og hald av Fossáverkinum, bæði sum dagarbeiði og vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Á Fossáverkinum eru 2 turbinur uppá tilsamans 6,4 MW. Undir Fossáverkinum hoyra eisini hesi vatnorkuverk og vindmyllur, sum verða stýrd frá Fossáverkinum:

- Mýruverkið við einari turbinu upp á 2,4 MW
- Heygaverkið við einari turbinu upp á 4,8 MW
- Eiðisverkið við tveimum turbinum upp á tilsamans 13,4 MW
- Vatnturbinan á Strond upp á 1,4 MW
- 4 vindmyllur í Neshaganum upp á tilsamans 2 MW.

Talan er sostatt um tilsamans 7 vatnturbinuaggregat og 4 vindmyllur við einum samlaðum mátti upp á 30,4 MW.

Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini í meginøkinum, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling).

Eisini er vakthavandi á Fossáverkinum koblingsleiðari fyri háspenningsanleggini í meginøkinum.

Tað er eitt krav, at tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá próvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga eisini úrtíðarløn.

Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða sendar til:

Elfelagið SEV
Postrúm 319
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi mikudagin 23. apríl 2008.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Pól Joensen, verksmeistara, á telefon 346800.

BÓNUS -er bíligari!

## Leiðari til Bónus í Miðvági

Kundi tú hugsað tær at verið leiðari í einum matvøruhandli?
So er tað kanska júst tær, vit hava brúk fyri. Vit søkja eftir leiðara til Bónus í Miðvági.

**Arbeiðið umfatar:**
Ein fjølbroyttan gerandisdag við nógvum avbjóðingum og ábyrgd. Hetta umfatar planlegging av arbeiði, vørubílegging, víðarimenning av starvsfólki, fakturaviðgerð, lønargóðkenning og alt, sum hoyrir til at reka ein handil.

**Vit vænta av tær:**
At tú hevur hollan kunnleika til matvøruhandilsyrkið og leiðslu.

**At byrja:**
So skjótt sum møguligt.

**Løn:**
Sambært førleikum og avtalu.

**Umsókn verður at senda til:**
Bónus
Postsmoga 1059
100 Tórshavn

**Merk brævbjálvan:**
"Bónus Miðvágur"